*Frá smáum KÍ-spælarum til fótbóltsstjørnur:*

# Todi og teir hava víst vegin

*Síðani Føroyar fóru upp í altjóða fótbólt, hava spælarar úr KÍ rættiliga verið við í fremstu røð - bæði á landsliðnum og sum yrkisspælarar í útlondum. Avsettið er tikið í barndómsfelagnum, men lopið hevur ikki verið so høgt, at teir hava gloymt felagið, har alt byrjaði*

**Teir hava spælt tilsamans 213 landsdystir fyri Føroyar.**




Teir hava skorað meira enn fjórða hvørt mál, sum Føroyar hava fingið í altjóða fótbólti.

Teir hava tikist við spælarar sum Michael Laudrup, Ryan Giggs, Thierry Henry, Georghe Hagi, Patrick Vieira, Ian Rush, Michael Ballack, Robert Procinecki, Enzo Scifo, Eiður Guðjohnsen og Roy Keane.

Teir hava skorað hjá málmonnum sum Peter Schmeichel og Andoni Zubizarreta.

Og teir hava spælt fyri feløg í fremstu røð í Danmark, Íslandi, Noregi og Skotlandi.

Todi Jónsson, Jákup Mikkelsen, Kurt Mørkøre, Allan Mørkøre og Rógvi Jacobsen traðkaðu sínar barnagaggur í KÍ, men síðani hava teir spælt fótbólt á hægsta stigi uttanlands - vunnið meistaraheiti, steypakappingar og verið toppskjúttar og árins spælarar í teirra feløgum.

Jú, teir hava roynt tað mesta og eru komnir so langt, sum bert fáir føroyskir fótbóltsspælarar koma. Teir hava víst øðrum vegin, og teir eru skúldømi um, hvussu miðvís venjing í ungdómsárum kann hava nakað stórt við sær.

Teir eru dømi um dreymin, sum kann gerast veruleiki, um evnini og viljin eru til staðar.

Fimm líltir og fittir KÍ'arar, sum gjørdust fótbóltsstjørnur í heimlandinum og útlandinum.

**Todi hetja í Keypmannahavn**

Todi Jónsson kom á 1. deildarliðið hjá KÍ longu sum 16 ára gamal í 1988. Har spældi hann saman við einum eldri ættarliði av spælarum, sum í stóran mun gavst at spæla í 1990.

Todi spældi í KÍ fram til 1993, tá ið hann fór til Havnar at spæla fyri B36 í eitt hálvt ár. Síðani gekk leiðin uttanlands, og Todi hevur uttan steðg spælt fyri útlendsk feløg síðani tá.

Fyrst var tað í Lyngby, har vegurin inn á besta liðið var langur og strævin. Men Todi vann á mál, og tá ið FC Keypmannhavn av álvara setti ferð á sína leið fram í toppin í donskum fótbólti í 1997, gjørdist Todi ein av stuðulsspælarunum har.

Todi vann fleiri donsk meistaraheiti og steypakappingina við FCK, og hann spældi fyri felagið til í fjør, tá ið sáttmálin rann út, og Todi flutti til Noregs at spæla fyri Start.

- KÍ er mítt barndómsfelag, og sjálvt um eg hevði eitt deiligt hálvár í B36, har fólkini rundan um B36 vóru ógvuliga ímøtikomandi, og eg tann dag í dag havi samband við nógvar B36-arar, so kann eg ikki koma uttan um at hjartað bankar fyri KÍ, sigur Todi.

- Tað er í KÍ, at eg havi havt mín fótbóltsuppvøkstur, tað er har, eg havi vunnið FM-heitið og Løgmanssteypið, og tað er ígjøgnum KÍ, at eg havi funnið nógvar vinmenn.

**Rendi inn í Kurt fyrsta dagin**

Todi Jónsson byrjaði at spæla fótbólt í KÍ sum 8 ára gamal. Tá var hann væl yngri enn spælararnir, sum hann spældi saman við og ímóti, og tað fekk



hann at merkja longu undir fyrstu venjingini.

- Eg minnist sera væl tann fyrsta dagin. Eg rendi saman við Kurt Mørkøre, sum var trý ár eldri, eg kom at liggja undir honun, fór at bløða næsablóð og varð noyddur at gevast at venja tann dagin. Tíbetur bleiv eg ikki meira forskrektur enn so, at eg fór at venja aftur næstu ferð, greiðir Todi frá.

Hann var við til at vinna fleiri meistaraheiti í yngru deildum saman við KÍ, og tað minnist hann gott aftur á.

- Tað vóru nakrir sera góðir árgangir í KÍ tá. Nógvir spælararnar, sum vóru á veg upp ígjøgnum deildirnar, komu langt innan fótbóltin, og tað sást eisini aftur við nógvum føroyameistaraheitum í yngru deildunum tey árini.

Manni Høgnesen var venjari hjá Toda nógv av ungdómsárunum, og hann tók sær væl av Toda og øllum hinum spælarunum á liðnum.

- Eg má eisini siga, at Mogens Højsted gav mær møguleikan at menna meg sum fótbóltsspælari, tí hann var sera tolin, tá ið eg stóð og sparkaði ímóti garðinum hjá honum. Hevði hann málað ella vaskað garðin, ja, so gekk ikki long tíð, til eg hevði dálkað garðin aftur, sigur Todi.

- Eg rokni við, at eg havi brúkt helvtina av mínari tíð í Klaksvík frammanfyri garðin hjá Mogens.

**Fótbóltur var alt**

Todi Jónsson hevði ein brennandi áhuga fyri fótbólti, og ein stórur partur av barna- og ungdómsárunum fóru við at spæla fótbólt.

- Fótbóltur var alt hjá mær. Eg spældi altíð fótbólt. Eg minnist, at onkuntíð um summarið spældu vit fótbólt alla náttina á vøllinum, sigur Todi.

Og brennandi áhugin, stóra ídni at spæla og venja og ein framúr sterkur vilji hava ført Todi fram í fremstu røð í bæði Danmark og Noregi. Hann hevur rættiliga skrivað seg inn í søgubøkurnar í superliguni, tí hann er í løtuni tann útlendski spælarin sum hevur spælt flestar dystir og gjørt flest mál í superliguni.

Tá ið áskoðararnir hjá FCK herfyri skuldu velja teir bestu spælararnar í søguni hjá felagnum, kom Todi inn sum nummar 5 av øllum teimum mongu, sum hava verið í hvítu troyggjuni hjá Toda.

Jú, hann hevur sanniliga gjørt vart við seg í Danmark, og nú spælir hann fyri eitt av fremstu feløgunum í Noregi, har hann longu hevur avrikið bæði eitt og annað.

**Allan endaði í Íslandi**

Allan Mørkøre spældi sín fyrsta 1. deildardyst fyri KÍ í 1988. Næstu árini var hann stuðulsspælari í KÍ og var við til at vinna FM-heitið í 1991 og steypakappingarnar í 1990 og 1994. Í 1997 flutti Allan til Havnar at spæla. Fyrstu árini spældi hann fyri HB, men so vóru boð eftir honum úr Íslandi, og Allan royndi seg frá 1999 til 2000 sum yrkisspælari í ÍBV á Vestmannaoyggjunum. Síðani Allan kom heimaftur at spæla, hevur hann spælt fyri bæði HB, B36 og KÍ, og nú er hann ein av spælarunum á 1. deildarliðnum hjá AB.

- Eg byrjaði rættiliga tíðliga at spæla fótbólt í KÍ, og eg minnist væl grúsvøllin, sum vit spældu á. Alt snúði seg um fótbólt hjá okkum, og tá ið vit ikki vandu ella spældu í KÍ, so spældu vit á vegnum úti á Bumshamri ella onkra aðrastaðni, sigur Allan Mørkøre.

- Venjingin av børnunum í KÍ tá á sinni kann ikki rættiliga samanlíknast við venjingina nú á døgum, men vit lærdu nógv av at spæla í KÍ og ikki minst av teimum endaleysu tímunum vit spældu fótbólt í frítíðini annars.

**Ræddist fyrsta dystin**

Allan Mørkøre og vinmenninir í grannalagnum høvdu mest sum bara fótbólt í høvdinum, og tað gav eisini úrslit.

- Eg og Jan Andreasen fylgdust altíð, og vit droymdu um at spæla á 1. deild saman. Tað gjørdu vit eisini seinni, sigur hann.

- Vit lærdu nógv av, at vit spældu so nógv fótbólt í frítíðini. Vit spældu grís ímóti einum garði og fór bólturin oman gjøgnum brekkuna, so snúði tað seg um at fáa bóltin niðan aftur við so fáum avleveringum sum gjørligt. Tað var avgjørt við til at menna mín sparkiteknikk, sigur Allan.

- Eg brúkti eisini nógva tíð til at sparka ímóti einum garði, royna at raka upp ein garð ella líknandi.

Tá ið Allan Mørkøre spældi sín fyrsta dyst uttanfyri Klaksvík, var tað á Sandi.

- Eg var sera nervøsur fyri dystinum. Vit fóru til Sands og yvirnáttaðu har. Tíbetur var Kurt við eisini, og tað var góð hjálp hjá mær, tí var ólukksáliga bangin fyri hesum fyrsta dystinum, greiðir Allan frá.

- Eg havi nógv góð minni frá teimum árunum, upplivingar, sum vit høvdu, og dreingirnir, sum spældu tá. Tað var ein góð tíð.

**Kurt toppskjútti í Noregi**

Kurt Mørkøre kom á 1. lið í KÍ longu í 1986 og fram til 1999, tá ið hann á fyrstan sinni fór uttanlands at spæla, var hann ein stuðulsspælari í KÍ. Í 1988 spældi Kurt í LÍF, og kappingarárið 1995 royndi hann seg í B68.

Í 1999 fekk norska felagið Sogndal eygað á málskjúttan úr Klaksvík, og teir gjørdu sáttmála við Kurt. Sogndal spældi í næstbestu norsku deildini, men við málum á samlibandi frá Kurt eydnaðist tað felagnum at flyta upp í Tippuliguna, har Kurt eisini royndi seg eitt kappingarár.

Kurt var í 2002 venjari í KÍ, og í fjør var hann aftur í bláu KÍ-troyggjuni, tá ið hann var tikin heim at hjálpa einum KÍ-liði í kreppu. Tá segði Kurt, at nú gavst hann sum spælari á høgum stigi, men hann hevur longu fingið royndir sum venjari og hevur áhuga í at taka onkra uppgávu á seg í framtíðini.

**Leyp dreingjadeildina um**

Kurt Mørkøre var ein framúr spælari longu í teimum yngru deildunum, og hann var so væl fyri - bæði fótbóltsliga og kropsliga - at hann onkuntíð veruliga spældi við í dreingjadeildini.

- Tá ið eg var liðugur at spæla í smádreingjunum, varð eg tikin beinleiðis upp í unglingadeildina. Fyrsta árið eg spældi við unglingunum blivu vit steypavinnarar, og eg gjørdi avgerandi málið. Eg minnist, at venjarin Olvheðin Jacobsen gav mær ein hálvan kylling og chips aftur fyri.

- Tað árið av øllum, sum eg minnist best, var í 1983, tá ið vit blivu føroyameistarar og høvdu ein málmun á 144-0. Eg var sweepari og toppskorari við 38 málum hetta árið.

Eins og hinir KÍ-spælararnir, sum endaðu í útlondum og á landsliðnum, hevði Kurt ein sera stóran áhuga fyri fótbólti, og nógv tíð fór við leðurkúluni.

- Eg, Allan, John William, Harley, Thom og Jan Andreasen spældu sera nógv fótbólt úti á





Bumshamri ella á spæliplássunum í Víkunum.

Kurt er blivin ein legenda í KÍ. Hansara avrik í bláu KÍ-troyggjuni eru nakað heilt serligt, og tað var enn einaferð staðfest, tá ið hann í fjør spældi nakrar dystir við KÍ og aftur skoraði fleiri mál.

- KÍ er mítt felag og tað felagið, sum eg veruliga føli nakað fyri. Eg fari eisini altíð at verða settur í samband við KÍ, og tað eri eg stoltur av. Hinvegin kundi tað saktans borið til at tikið onkra venjarauppgávu fyri annað felag á meg, heldur Kurt, sum hóast hann hevur búsett seg í Noregi hevur umhugsað møguleikan at koma heim til Føroya at vera venjari okkurt árið.

**Jákup í trimum londum**

Jákup Mikkelsen hevði tey sjáldsomu evni, at hann var bæði góður málmaður og útispælari, og hann spældi eina tíð sum útispælari á 1. deildarliðnum hjá KÍ. Jákup kom á 1. lið fyrstu ferð í 1987, og fram til 1994 var hann tryggi málmaðurin á liðnum. Eftir at Jákup hevði skorað fyri KÍ í steypafinaluni í 1994, sum KÍ vann 2-1, fór hann til Danmarkar at royna seg, og har vann hann rættiliga fram í Herfølge.

Tað kom púra óvart á øll, tá ið tað í 2000 eydnaðist Herfølge at gerast danskur meistari. Lítla bygdafelagið hevði eitt ófført ár, og Jákup Mikkelsen var ein týðandi brikkur í spælinum.

Jákup fór eftir tíðina í Herfølge til Noregs at spæla fyri Molde, og áðrenn hann legði leiðina heimaftur til Føroya, spældi hann eisini í Partick Thistle í bestu skotsku deildini.

Síðani Jákup kom heim til Føroya aftur, hevur hann spælt í KÍ, og í fjør var hann kanska høvuðsorsøkin til, at B36 gjørdist føroyameistari. Jákup var sera hóskandi valdur til ársins spælara í 2005.



**Ovara mál er okkara mál**

Jákup Mikkelsen spældi onkur av ungdómsárunum á sama liði sum Kurt Mørkøre, og Jákup minnist eisini serliga væl árið 1983, tá ið teir vunnu føroyameitaraheitið á ein serliga sannførandi hátt.

- Tað árið vóru Andras og Eyðfinn Reyðberg venjarar hjá okkum, men eg hevði eisini fleiri aðrar venjarar. Fyrsta árið, eg spældi, vóru Beinur Poulsen og Oddbjørn Joensen venjarar hjá mær, og seinni hevði eg millum annað Olgar Danielsen og Benros Dahl, sigur Jákup.

- Venjingin snúði seg nógv um at spæla dystir, og tað lærdu vit nógv av. Tað var altíð stuttligt at spæla fótbólt, og tá ið vit ikki vandu, so vóru vit fyri tað mesta á vøllinum alíkavæl. Eg kalli framvegis tað ovara málið fyri okkara mál.

Jákup Mikkelsen hevði eitt framúr gott kappingarár í fjør, og hann er framvegis besti málmaður í Føroyum. Hann er fyrsta val til landsliðið, og har hevur hann gjøgnum árini havt nógv framúr góð avrik.

Nú bíða nýggjar og spennandi uppgávur ímóti Italia, Fraklandi, Skotlandi, Ukraina, Litava og Georgia, og álopsspælarar sum Thierry Henry, Andrei Schevchenko og Fransesco Totti fáa at síggja, at tað er ikki bara sum at siga tað at skora hjá klaksvíkinginum í føroyska málinum.

Lítli spælarin við ovara málið hevur longu tikið broddin av bæði Henry, Ballack og øðrum heimsstjørnum.

**Rógvi skorar í Íslandi**

Rógvi Jacobsen snoddaði fyrstu ferð til 1. deildarfótbólt í 1996, og næstu árini gjørdist hann ein fastur spælari á KÍ-liðnum. Í 1999 vann KÍ greipuna, og tá spældi Rógvi ein avgerandi leiklut við máli í steypafinaluni og 10 málum í teimum 18 landskappingardystunum.

Rógvi flutti í 2001 til Havnar at spæla fótbólt, og har var hann partur av sigurrøðini hjá HB við tri-





mum meistaraheitum á rað. HB byrjaði at nærkast 66-liðnum hjá KÍ, sum vann fimm meistaraheiti á rað, men tíbetur fór Rógvi til Íslands at spæla í fjør, og so megnaði HB ikki at endurvinna FM.

Rógvi hevur seinasta árið verið sáttmálabundin við íslendska felagið KR, og nakrar mánaðir í fjør varð hann leigaður til danska superligafelagið SønderjydskE. Nú er Rógvi aftur í KR, har hann javnan skorar mál fyri felagið úr Reykjavík.

- Tað er bæði spennandi og krevjandi at spæla fótbólt í Íslandi. Vit venja 9 ferðir um vikuna, men eg havi bara fótbóltin at hugsa um, og tí fái eg eisini neyðugu hvíldina hvønn dag, sigur Rógvi.

Hann er tann einasti av teimum fimm í hesi grein, sum ongantíð vann nakað FM í ungdómsdeildunum, men tað hevur Rógvi so dyggiliga tikið aftur, tí hann er tann av hesum fimm, sum hevur verið oftast føroyameistari - heilar fýra ferðir síðani 1999. Hann er eisini farin at hótta Toda sum toppskjútta á landsliðnum, tí Rógvi hevur skorað seks mál, meðan Todi hevur gjørt nýggju.

**Skoraði fyrsta málið á graslíki**

Rógvi Jacobsen byrjaði at spæla fótbólt í KÍ í 1987, og árið eftir fekk hann heiðurin at skora fyrsta málið á nýggja graslíkisvøllinum í Klaksvík. Tá ið vøllurin var tikin í nýtslu á stóra almennum hátíðarhaldið, skuldi Rógvi senda fyrsta bóltin í netið sum partur av hesum hátíðarhaldi, og tað gjørdi tann trygt. Síðani hevur hann skorað nógv mál í sama máli.

- Árini í ungdómsdeildunum hjá KÍ vóru sera góð. Eg spældi við á fleiri góðum liðum, men vit kláraðu tíverri ongantíð at gerast føroyameistarar, sigur hann.

Men tað komu fleiri góðir fótbóltsspælarar burtur úr hesum árganginum fyri tað- millum annað Rógvi og Heðin á Lakjuni.

Spælarar úr KÍ hava vunnið fleiri donsk meistaraheiti, og Todi var líka við at vinna norska meistaraheitið í fjør. Hvør veit, um Rógvi verður fyrsti spælarin úr Klaksvík, sum verður íslendskur meistari.

**Brennandi áhugi og endaleysir tímar**

Um tikið verður saman um teir fimm profilarnar, sum vit hava umrøtt í hesi grein, so hava teir ymiskt til felags.

Tað fyrsta, sum veruliga stendur fremst hjá teimum øllum, er ein brennandi áhugi fyri fótbóltinum. Teir hava brúkt eina rúgvu av tíð til fótbólt - bæði í KÍ og í frítíðini annars - og tá ið evnini samstundis hava verið framúr góð, hevur tað gjørt teir til nakrar av Føroya bestu fótbóltsspælarum.

Tað er ikki nóg mikið, at evnini eru góð. Spælararnir skulu eisini hava ein vilja til at menna seg og at náa langt, og tað hava allir fimm. Tað er ikki av tilvild, at teir eru komnir so langt, sum teir eru komnir innan fótbóltin.

Teir eru góðar fyrimyndir hjá okkara ungu fótbóltsspælarum, sum droyma um at koma á besta liðið hjá KÍ, landsliðið og kanska sleppa uttanlands at spæla.

Dreymurin kann gerast til veruleika, um tú veruliga vilt tað og arbeiðir fyri tí!



## Todi Jónsson

Føddur: 2. februar 1972
**Starv:**
Yrkisfótbóltsspælari
**Feløg:**
KÍ, B36, AGF, Lyngby, FC Keypmannahavn og Start
**Landsdystir:**
45 - 9 mál
**Føroyameistari:**
KÍ 1991
**Steypavinnari:**
KÍ 1990
**Danmarksmeistari:**
FCK 2001, 2003 og 2004
**Steypavinnari í Danmark:**
FCK 2004
**Vinnari av Royal League:**
FCK 2005



## Jákup Mikkelsen

**Føddur:**
14. august 1970
**Starv:**
Lesandi á Læraraskúla
**Feløg:**
KÍ, B36, Herfølge, Molde, Partick Thistle
**Landsdystir:**
41
**Føroyameistari:**
KÍ 1991, B36 2005
**Steypavinnari:**
KÍ 1990 og 1994.
**Danmarksmeistari:**
Herfølge 2000



## Allan Mørkøre

**Føddur:**
22. november 1971
**Starv:**
Pedagogur
**Feløg:**
KÍ, B36, HB, ÍBV, AB
**Landsdystir:**
54 landsdystir, 1 mál
**Føroyameistari:**
KÍ 1991, HB 1998, B36 2005
**Steypavinnari:**
KÍ 1990 og 1994, HB 1998 og B36 2003



## Kurt Mørkøre

**Føddur:**
20. februar 1969
**Starv:**
Bakari
**Feløg:**
KÍ, LÍF, B68, SIF Ålesund, Sogndal, Eide Omegn
**Landsdystir:**
37 - 3 mál
**Føroyameistari:**
KÍ 1991 og 1999
**Steypavinnari:**
KÍ 1990, 1994 og 1999



## Rógvi Jacobsen

**Føddur:**
5. mars 1979
**Starv:**
Yrkisfótbóltsspælari
**Feløg:**
KÍ, HB, KR, Sønderjydske
**Landsdystir:**
36 - 6 mál
**Føroyameistari:**
KÍ 1999, HB 2002, 2003 og 2004
**Steypavinnari:**
KÍ 1999, HB 2004

